UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **21. mars 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-83**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-140/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, um játtan til heilsugransking, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at útvega neyðuga peningin til gransking v.m., ið varð fíggjað úr Sjúkrakassagrunninum, so hendan kann halda fram?
2. Nær kann væntast, at møgulig meirjáttan verður tøk?
3. Fer arbeiðið at halda fram eftir sama leisti, soleiðis at peningur eisini verður tøkur til smærri verkætlanir?

Svar

Til 1: Samgongan hevur upprøfest at skipa føroyska granskingarøkið í síni heild við at smíða nýtt lógarverk fyri økið. Hetta bæði við løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan og við kunngerð nr. 84 frá 25. mai 2021 um tilnevning av limum í ráðið fyri gransking, menning og nýskapan.

Skipanin av granskingarøkinum er enn í síni tilgongd, har landsstýrismaðurin hevur sett ráðið fyri gransking, menning og nýskapan, sum verður virkið frá 31. mars 2022, og sum m.a. skal arbeiða við einari strategiskari ætlan fyri gransking í Føroyum og uttanlands.

Nýggja skipanin leggur upp til, at ein felags fyrisiting fyri gransking, menning og nýskapan verður, sum er galdandi fyri alt landsstýrið. Tey ymsu landsstýrisfólkini kunnu soleiðis lata hesi felags fyrisiting upp í hendi at umsita granskingarjáttanina innan teirra málsøki – eitt nú innan heilsuøki. Tá verður skipað ein sjálvstøðug faknevnd, sum er mannað við fakfólkum innan hetta ávísa málsøki, sum skal stjórna stuðulsskipanum og hava evstu ábyrgd av málsviðgerð og avgerð um at játta stuðul í samsvari við ásettar reglur innan hetta øki.

Løgtingið hevur somuleiðis samtykt sáttmála um atlimaskap í granskingar- og nýskapanarsamstarvinum hjá ES, Horizon Europe, har til ber hjá føroyskum granskarum at søkja fígging til bæði altjóða og føroyskar granskingarverkætlanir, herímillum eisini granskingarverkætlanir innan heilsu. Væntandi verður sáttmálin undirskrivaður við ES hesa árshálvuna.

Til 2: Játtanin til heilsugransking verður partur av tí faknevnd, sum verður sett undir avvarðandi aðalráði. Vísandi til spurning 1, er hetta partur av tí tilgongd, sum snýr seg um at skipa granskingarøkið í síni heild.

Til 3: Tað er onki til hindurs fyri, at játtan verður latin smærri verkætlanum. Størri og smærri verkætlanir fáa tó stuðul eftir tí meting, sum faknevndirnar koma ásamt um, sum er ein ítøkilig faklig meting av teimum umsóknum, sum gera seg galdandi, og sum í síni viðgerð verða samanbornar við hvørja aðra.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður